UTTAN ÚR HEIMI

### Ósemja í OPEC

Á fundi í næstu viku skulu londini í OPEC-felagskapinum taka støðu til, hvussu nógva olju tey skulu framleiða.

ES-nevndin hevur mælt OPEC-londunum til at økja framleiðsluna eina millión tunnur um dagin fyri at tryggja, at nóg mikið av olju er á marknaðinum, men Iran hevur longu boðað frá, at hesum er landið ímóti. Iranska stjórnin hevur tvørturímóti sagt, at hon fer at mæla londunum til at skerja framleiðsluna, so londini halda seg til tær framleiðslukvoturnar, sum tey upprunaliga høvdu.

Í mai framleiddu OPEC-londini næstan 30 milliónir tunnur um dagin, meðan tann almenna kvotan var 27,5 milliónir tunnur. Skal framleiðslan økjast, er tað næstan bara Saudi-arabia, sum er ført fyri at økja sína framleiðslu, skrivar Reuters.

Kuwait og Indonesia hava sagt seg vera til reiðar at varðveita verandi framleiðslu, og Venesuela sigur, at annaðhvørt skal verandi framleiðsla standa við, ella skal hon skerjast.

### Danir rýma suðureftir

Donsku ferðaskrivstovurnar hava havt úr at gera í seinastuni, tí nógv fólk vilja sleppa suður í heitari lond at halda summarfrí.

Veðrið í Danmark hevur verið rættiliga óstøðugt í seinastuni, og tað hevur fingið uppaftur fleiri at keypa ferðaseðlar suðureftir, soleiðis at nú eru umleið 80 prosent av øllum ferðaseðlunum í summar seldir. Herfyri gjørdu ferðaskrivstovurnar av at bjóða fólki 18.000 ferðaseðlar afturat, og teir hava gingið sum heitt breyð, skrivar Politiken.

Sambært ferðaskrivstovunum fara 768.000 danir suður í heitari lond at halda summarfrí í ár, og tað eru 45.000 fleiri enn í fjør. Tær griksku oyggjarnar tykjast vera sera væl umtóktar í ár, men Turkaland og Bulgaria eru eisini sera væl umtókt frítíðarmál hjá dønum.

### Lula missir undirtøku

Tann eina ferð so væl umtókti brasilski forsetin, Luis Inacio Lula da Silva, er ikki so væl umtóktur longur.

Tað er kortini ikki bara forsetin, men øll stjórnin, sum hevur mist undirtøku ímillum brasilska fólkið. Ein nýggj kanning vísir, at bara 35 prosent av teimum spurdu styðja stjórnina og tað arbeiðið, sum hon ger, og so lítla undirtøku hevur stjórnin ikki havt, síðani Lula varð valdur til forseta í 2003, skrivar AP.

Trupulleikin er, at framgongdin í brasilska búskapinum hevur ikki verið so stór, sum fólk høvdu roknað við, og harafturat hava fjølmiðlar og onnur lagt summar stjórnarlimir undir korrupsjón. Sambært teirri nýggju kanningini halda heili 65 prosent, at stjórnin ella einstakir ráðharrar eru sekir í korrupsjón. Fyri einum ári síðani vóru tað bara 32 prosent, sum høvdu ta áskoðanina, skrivar AP.

### Oljuleiðing hóttir djór

Russisku myndugleikarnir ætla at leggja eina oljuleiðing úr Irkutsk til kyrrahavsstrondina og at byggja eina stóra avskipingarhavn har. Men djóraverndarfelagsskapir eru ímóti, tí teir vænta, at leiðingin og havnin fara at forkoma tí sjáldsama amurleopardinum.

Vanliga rokna vit leopardin sum eitt djór, sum heldur til í teimum heitu økjunum í Afrika, men hóast tað mangan er sera kalt har eysturi í Russlandi við markið ímóti Kina og Norðurkorea, heldur amurleopardurin til har. Russiskir djórafrøðingar siga við Aftenposten, at stovnurin er minkaður nógv tey seinnu árini, tí menn veiða amurleopard, sjálvt um tað er ólógligt. Teir stúra tí fyri, at ein oljuleiðing og ein stór avskipingarhavn fara at gera enda á stovninum.

Økið, har oljuhavnin skal byggjast, er friðað náttúruøki, og russiskir djórafrøðingar siga, at har eru umleið 30 prosent av teimum russisku djórasløgunum, sum eru skrásett sum hótt. Teirra millum eru teir seinastu amurleopardarnir, sum neyvan eru meiri enn umleið 30 í tali í dag, siga teir.

Oljuleiðingin, sum russar ætla at leggja, verður 4.200 kilometrar long og fer at kosta umleið 90 milliardir krónur.

# Longu betur umtókt enn Schrøder

**Sum er er tað einki, sum kann forða Angelu Mærkel at gerast fyrsta kvinnan í týska kanslaraembætinum. Men enn er valið ikki útskrivað**

TÝSKLAND
*Árni Joensen*
*fartekstmail.dk*



*Kundu týskarar valt kanslaran beinleiðis, høvdu teir valt Angelu Mærkel*

*Mynd: Reuters*

Hon skal gera okkurt álvarssamt mistak, ella skal hann finna upp á eitt ella annað heilt framúrskarandi.

Fyri einari viku síðani gjørdist greitt, at Angela Mærkel er kanslaraevni hjá teimum borgarligu í Týsklandi til valið í heyst, og alt bendir á, at tað var eitt gott val. Sunnudagin søgdu 46 prosent av teimum spurdu týskarunum, at kundu tey valt kanslaran beinleiðis, høvdu tey valt Angelu Mærkel. 38 prosent svaraðu, at tey høvdu valt Gerhard Schrøder aftur.

Úrslitið vísir, at undirtøkan hjá Angelu Mærkel er vaksin tíggju prosentstig tann seinasta mánaðin, samstundis sum Schrøder hevur mist fimm prosentstig av sínari undirtøku.

Teir báðir kristiligu flokkarnir, CDU og CSU, høvdu fingið so stóra undirtøku, var val til samveldistingið nú, at teir høvdu kunnað skipa stjóran uttan hjálp frá teimum fríu demokratunum. Teir báðir flokkarnir høvdu fingið 48 prosent, meðan sosialdemokratarnir hjá kanslaranum høvdu fingið 28 prosent. Hin stjórnarflokkurin, Tey Grønu, hevði fingið níggju prosent.

**Grundlógin forðar vali**

Tað er kortini ikki óhugsandi, at Angela Mærkel og stuðlar hennara noyðast at bíða longri eftir sigrinum enn ætlað, tí enn er ikki vist, at val verður í Týsklandi í heyst, sjálvt um Schrøder hevur boðað frá tí.

Trupulleikin er, at Schrøder kann ikki koyra samveldistingið til hús, og tað kann samveldistingið heldur ikki gera Skuldi tað hent, at samveldistingið samtykkir at upploysa seg sjálvt, er tað upp til foretan at taka avgerð um nýval, og formliga eigur hann ikki at skriva út nýval uttan so, at stjórnin fellur við einum misálitisuppskoti. Og tað ger hon ikki.

Hin møguleikin er, at grundlógin verður toygd og tambað fyri at fáa nýval, men grundlógardómstólurin í Karlsruhe, sum hevur ta endaligu avgerðina í slíkum málum, hevur sagt, at tí er hann ikki hugaður fyri.

# Victoria eigur ikki at blíva drotning

**Fleiri leiðandi svenskir politikarar halda, at svenska kongsveldið eigur at verða avtikið, tá Carl Gustav kongur doyr**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



– Rætturin at arva starvið sum ríkisleiðari er ikki sambæriligt við demokratið. Tíðin er komin til at taka kongsveldið av, takka fyri tess tíð og at taka stigið ímóti einum nútímans lýðveldi.

Soleiðis stóð at lesa í einari grein, sum nakrir svenskir tinglimir kunngjørdu beint undan svenska tjóðardegnum, sum var í gjár. Tinglimirnir eru úr sosialdemokratiska flokkinum, Vinstraflokkinum og Umhvørvisflokkinum, men umframt teir høvdu nøkur týðandi vísindafólk og mentafólk skrivað undir.

Tað er einki nýtt, at politikarar á svenska vinstravonginum vilja hava landið skipað sum lýðveldi, men sambært Dagens Nyheter hevur kravið sjáldan verið so greitt sum hesaferð.

Kanningar í svenskum bløðum í gjár vístu kortini, at nógv tey flestu vilja varðveita kongshúsið, og at tey vilja hava Victoriu krúnprinsessu at taka við eftir faðirin.

*Fáa politikararnir á svenska vinstravonginum sín vilja, verður Victoria ikki svensk drotning*